# IRF

ÁRSFRÁSØGN
2011

# INNIHALDS **YVIRLIT**


Upplýsingar um felagsskapin . . . . . . 2
IRF fyriskipan . . . . . . 3
Limakommunur og fólkatal . . . . . . 4
Leiðslufrágreiðing . . . . . . 5
Undir sjóneykuni . . . . . . 8
Hagtøl . . . . . . 13
Høvuðstøl . . . . . . 18
Gongdin í rakstrinum 2003–20110 . . . . . . 21
Rakstrarúrslit samanborið við broyttu fíggjarætlanina fyri 2011 . . . . . . 22
Leiðsluátekning . . . . . . 23
Váttan frá óheftum grannskoðara . . . . . . 24


**Ársroknskapur 1. januar–31. desember 2011**


Nýttur roknskaparháttur . . . . . . 25
Rakstrarroknskapur 1. januar–31. desember 2011 . . . . . . 27
Fíggjarstøða pr. 31. december 2011 . . . . . . 28
Rakstrarroknskapur býttur á økir . . . . . . 29
Notur til roknskapin . . . . . . 30
Gjaldførisfrágreiðing 2011 . . . . . . 38
Skjal 1 Rakstrarroknskapur fyri Spilloljuverkið . . . . . . 39
Skjal 2 Rakstrarroknskapur fyri Rottangaskipanina . . . . . . 40
Skjal 3 Rakstrarroknskapur fyri Verkstaðið . . . . . . 41
Skjal 4 Vandamikið burturkast . . . . . . 42
Skjal 5 Rakstrarroknskapur fyri Endurnýtsluskipanina . . . . . . 43

# UPPLÝSINGAR UM FELAGSSKAPIN

## Felagsskapurin

| | |
|---|---|
| **Navn:** | L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin IRF |
| **Bústaður:** | Víkarvegur 107, 520 Leirvík |
| **Heimstaðarkommuna:** | Eysturkommuna |
| **Arbeiðsgevaratal:** | 353.477 |
| **Stovningarár:** | 1979 |
| **Starvsfólk:** | 70 |
| **Teldubústaður:** | irf@irf.fo |
| **Heimasíða:** | www.irf.fo |
| **Tlf.** | 41 42 43 |
| **Fax** | 41 42 44 |

## Nevnd

Johannes Klein, Vágar, formaður
Tom Joensen, Eysturoy, næstformaður
Harry Jensen, Sandoy
Soffi Egholm, Streymoy
Atli S. Justinussen, Norðoyggjar
Dánjal Bjarkhamar, Suðuroy

## Stjórn

Poul Andrias Joensen, stjóri

## Grannskoðan

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Telefon: 31 47 00 – Telefax: 31 38 15
Teldubústaður: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin fyri 2011 er góðkendur á ársaðalfundinum, tann ______________________ 2012

______________________________________________

Fundarstjóri

# IRF Fyriskipan 2011

29 Limakommunur

Aðalfundur

Nevnd



Johannes Klein
Nevndarformaður



Tom Joensen
Næstformaður



Harry Jensen
Nevndarlimur



Soffi Egholm
Nevndarlimur



Atli S. Justinussen
Nevndarlimur



Dánjal Bjarkhamar
Nevndarlimur



Poul Andrias Joensen
Stjóri



Ingvard Fjallstein
Umhvørvisleiðari



Hallgerð Lervig

Umsiting
Bókhald
Lønarroknskapur
Tryggingar



Jacob Petur Johannesen

Brennistøðin
Spilloljuverkið



Adelbert Ellingsgaard

Rottanga skipanin
Slammsúgving
Endurnýtsla



Jógvan Júst Olsen

Meginøkið, Sandoy og útoyggjar:

Ruskinnsavning
Bingjupláss
Tyrvingarpláss
Bingjur
Flutningur
Serliga dálkandi



Torfinn Mortensen

Suðuroy:

Ruskinnsavning
Umlastingarstøð
Tyrvingarpláss



Petur Højgaard

Verkstaðið:

Bilar
Bingjur
Maskinur

# LIMAKOMMUNUR OG FÓLKATAL

| LIMAKOMMUNA – ØKIR | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | PRIMO 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fugloyar Kommuna | 46 | 45 | 44 | 44 | 43 | 40 | 38 | 38 | 37 |
| Viðareiðis Kommuna | 342 | 341 | 345 | 339 | 352 | 351 | 355 | 348 | 346 |
| Hvannasunds Kommuna | 446 | 449 | 454 | 441 | 435 | 440 | 435 | 426 | 418 |
| Klaksvíkar Kommuna | 4.978 | 4.957 | 4.934 | 4.936 | 4.936 | 4.931 | 4.839 | 4.813 | 4.857 |
| Kunoyar Kommuna | 135 | 141 | 148 | 157 | 160 | 159 | 152 | 140 | 128 |
| Húsa Kommuna | 62 | 57 | 61 | 61 | 60 | 58 | 57 | 54 | 50 |
| **Norðoyggjar** | **6.009** | **5.990** | **5.986** | **5.978** | **5.986** | **5.979** | **5.876** | **5.819** | **5.836** |
| | | | | | | | | | |
| Fuglafjarðar Kommuna | 1.591 | 1.575 | 1.568 | 1.585 | 1.545 | 1.555 | 1.535 | 1.531 | 1.515 |
| Eysturkommuna | 1.928 | 1.928 | 1.933 | 1.936 | 1.963 | 1.959 | 1.962 | 1.978 | 1.977 |
| Nes Kommuna | 1.223 | 1.217 | 1.221 | 1.242 | 1.248 | 1.258 | 1.268 | 1.264 | 1.234 |
| Runavíkar Kommuna | 3.694 | 3.730 | 3.717 | 3.747 | 3.756 | 3.784 | 3.797 | 3.832 | 3.798 |
| Sjóvar Kommuna | 1.043 | 1.043 | 1.029 | 1.028 | 1.019 | 1.013 | 1.005 | 958 | 954 |
| Eiðis Kommuna | 717 | 719 | 711 | 703 | 695 | 695 | 666 | 671 | 663 |
| **Eysturoy** | **10.196** | **10.212** | **10.179** | **10.241** | **10.226** | **10.264** | **10.233** | **10.234** | **10.141** |
| | | | | | | | | | |
| Sunda Kommuna | 1.517 | 1.560 | 1.560 | 1.565 | 1.591 | 1.650 | 1.648 | 1.659 | 1.674 |
| Kvívíkar Kommuna | 594 | 607 | 606 | 616 | 606 | 604 | 592 | 585 | 588 |
| Vestmanna Kommuna | 1.240 | 1.241 | 1.228 | 1.235 | 1.227 | 1.252 | 1.194 | 1.202 | 1.222 |
| Nólsoyar Kommuna | 262 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Streymoy** | **3.613** | **3.408** | **3.394** | **3.416** | **3.424** | **3.506** | **3.434** | **3.446** | **3.484** |
| | | | | | | | | | |
| Vága Kommuna | 1.790 | 1.827 | 1.861 | 1.891 | 1.912 | 1.949 | 1.943 | 1.939 | 1.967 |
| Sørvágs Kommuna | 1.084 | 1.084 | 1.071 | 1.072 | 1.098 | 1.133 | 1.139 | 1.126 | 1.112 |
| **Vágar** | **2.874** | **2.911** | **2.932** | **2.963** | **3.010** | **3.082** | **3.082** | **3.065** | **3.079** |
| | | | | | | | | | |
| Sands Kommuna | 587 | 599 | 586 | 589 | 577 | 584 | 557 | 556 | 524 |
| Skopunar Kommuna | 497 | 480 | 487 | 508 | 508 | 505 | 490 | 470 | 467 |
| Skálavíkar Kommuna | 203 | 184 | 180 | 184 | 176 | 169 | 164 | 162 | 155 |
| Húsavíkar Kommuna | 140 | 141 | 133 | 131 | 129 | 125 | 126 | 125 | 129 |
| Skúvoyar Kommuna | 68 | 62 | 60 | 57 | 60 | 55 | 51 | 45 | 44 |
| **Sandoy** | **1.495** | **1.466** | **1.446** | **1.469** | **1.450** | **1.438** | **1.388** | **1.358** | **1.319** |
| | | | | | | | | | |
| Hvalbiar Kommuna | 771 | 778 | 763 | 766 | 759 | 733 | 723 | 712 | 709 |
| Tvøroyrar Kommuna | 1.850 | 1.836 | 1.807 | 1.823 | 1.802 | 1.772 | 1.742 | 1.725 | 1.692 |
| Fámjins Kommuna | 111 | 115 | 118 | 114 | 111 | 110 | 108 | 108 | 107 |
| Hovs Kommuna | 132 | 131 | 126 | 125 | 119 | 115 | 122 | 120 | 118 |
| Porkeris Kommuna | 367 | 359 | 346 | 332 | 338 | 335 | 328 | 314 | 314 |
| Vágs Kommuna | 1.433 | 1.431 | 1.409 | 1.403 | 1.417 | 1.405 | 1.361 | 1.376 | 1.377 |
| Sumbiar Kommuna | 414 | 391 | 379 | 383 | 379 | 379 | 377 | 362 | 353 |
| **Suðuroy** | **5.078** | **5.041** | **4.948** | **4.946** | **4.925** | **4.849** | **4.761** | **4.717** | **4.670** |
| | | | | | | | | | |
| **IRF tilsamans** | **29.265** | **29.028** | **28.885** | **29.013** | **29.021** | **29.118** | **28.774** | **28.639** | **28.529** |

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## Inngangur

Í nógvar mátar hevur 2011 verið eitt sermerkt ár fyri IRF.

Arbeiðið at byggja nýtt spilloljuverk og høll til serliga dálkandi burturkast á Hagaleiti byrjaði í juli, men av ymsum orsøkum er arbeiðið nógv seinkað. Seinast í januar 2012 kom aftur gongd á byggingina av sjálvum verkinum, og rokna vit við at taka nýggja spilloljuverkið og høllina til serliga dálkandi burturkast í nýtslu seinast í 2012.

Hóast IRF í Føroya Rætti fekk viðhald í sakarmálinum móti Tórshavnar Kommunu viðvíkjandi Nólsoyar Kommunu, fekk IRF ikki viðhald í Landsrættinum. IRF metir hetta málið nú at vera endaliga avgreitt.

Í februar tók IRF talgilda skipan til tilrættalegging, innheinting og skráseting av burturkasti í nýtslu. Skipanin ger, at veitingar verða faktureraðar munandi fyrr enn frammanundan, samstundis sum virksemið eisini verður munandi betur lýst.

Nýggja avrokningarskipanin fyri burturkast frá bingjuplássunum hevur sum heild roynst sum mett frammanundan. Nevndin hevði tó roknað við, at kommunurnar fóru at leggja seg meira eftir at skilja burturkastið og í summum førum eisini at avmarka atgongdina til bingjuplássini fyri at minka um kostnaðin.

## Búskaparliga gongdin

Rakstrarúrslitið fyri 2011 er 2,07 mió. kr. betri enn mett frammanundan.

Inntøkurnar eru 0,32 mió. kr. lægri enn í 2010, meðan útreiðslurnar eru 0,16 mió. kr. lægri. At inntøkurnar eru lægri enn í 2010 kemst m.a. av, at IRF gavst við gomlu gjaldseðlaskipanini, og kundarnir fingu kreditnotu, so hvørt gjaldseðlarnir komu innaftur.

Samlaðu íløgurnar í 2011 vóru 7,56 mió. kr. Av hesum vóru 1,05 mió. kr. gjørdar í Brennistøð og ymiska útgerð, 0,52 mió. kr. vóru gjørdar í ruskpláss og endurnýtsluskipan, 1,37 mió. kr. vóru gjørdar í rottangaskipan og verkstað, meðan íløgur fyri 4,62 mió. kr. vóru gjørdar í nýtt spilloljuverk og høll til serliga dálkandi burturkast.

Samlaða lánsskuldin er 3,96 mió. kr. hægri enn í 2010, meðan rentuútreiðslurnar eru 0,27 mió. kr. hægri.

Avskrivað er eftir sama leisti sum í 2010.

IRF hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um rakstur av Spilloljuverkinum á Kambsdali. Sambært sáttmálanum verður roknskaparhallið fyri Spilloljuverkið goldið úr Landskassanum, tó ikki meira enn tað, sum er avsett á fíggjarlógini.

Á fíggjarlógini fyri 2011 vóru avsettar 3,50 mió. kr. til spilloljureinsing.

Roknskapirnir fyri Spilloljuverkið, Rottanga- og kloakktænastuna, Verkstaðið, Serliga dálkandi burturkast og Endurnýtsluskipanina eru við í høvuðsroknskapinum, men eru samstundis settir upp í egnum skjølum.

Bruttoúrslitð gjørdist 46,60 mió. kr., sum er 0,47 mió. kr. betri enn í 2010. Rakstrarúrslitið gjørdist eitt yvirskot á 5,22 mió. kr., sum er 0,28 mió. kr. betri enn í 2010.

Fíggjarstøðan javnvigar við 131,76 mió. kr. í 2011, í mun til 122,81 mió. kr. í 2010.

Við ársenda var jarngoymslan á Gjánoyri uml. 790 tons. Harav eru 756 tons seld í januar í 2012.

Við ársenda hevði IRF 30,60 mió. kr. á bók. Hetta kemur av, at IRF hevur tikið lán til nýggja Spilloljuverkið, ávikavist 6 mió. kr. í september 2010 og 14 mió. kr. í mars 2011. Av tí at byggingin hevur drigið út, er hesin peningur enn ikki allur brúktur. Innistandandi á bók, sum stavar frá hesum lántøkunum, var við árslok 14,50 mió. kr.

Sostatt er veruliga gjaldførið 16,10 mió. kr, sum er áleið tað sama sum við ársenda í fjør.

## Limakommunur og fólkatal

Fólkatalið 1. januar 2012 er 28.529, sum er ein minking upp á 110 fólk í mun til 1. januar 2011.

Í Eysturoynni, á Sandoynni og í Suðuroynni er fólkatalið minkað við 179 fólkum, meðan tað í Vágunum, í Norðstreymoynni og Norðoyggjunum er vaksið við 69 fólkum.

Í langtíðarætlanini hjá IRF verður roknað við eini lækking í fólkatalinum fram til 2015, tá ið vit rokna við einum lítlum vøkstri aftur.

## Limagjald

Á aðalfundinum 29. apríl í 2011 samtykti aðalfundurin hjá IRF at hækka ruskgjaldið úr 1.085,- kr/íbúgva til 1.095,- kr/íbúgva og rottangagjaldið úr 180,- kr/íbúgva til 190,- kr/íbúgva.

Nevndin mælir til at lækka limagjaldið aftur fyri 2012, so tað verður óbroytt í mun til í 2011, soleiðis at ruskgjaldið verður 1.085,- kr/íbúgva og rottangagjaldið verður 180,- kr/íbúgva.

Nevndin mælir eisini til, at limagjaldið verður óbroytt í 2013.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Eftir roknskaparlok er einki hent, sum broytir metingina av fíggjarligu støðu felagsins.

## Íløgur og fígging

Sum kunnugt hevur IRF gjørt nógvar stórar íløgur seinastu árini, sum t.d.:

- Nýggja filturskipan til Brennistøðina á Hagaleiti
- Umbygging av brenniovninum á Hagaleiti
- Bygging av nýggjum spilloljuverki á Hagaleiti, sum er í gongd nú

Nýggja filturskipanin og umbyggingin av brenniovninum á Hagaleiti kostaðu IRF uml. 55 mió. kr., meðan nýggja spilloljuverkið og høllin til serliga dálkandi burturkast kemur at kosta okkum uml. 30 mió. kr.

Umbyggingina av brenniovninum á Hagaleiti hava Føroya Lívstrygging og BankNordik fíggjað, meðan BankNordik hevur fíggjað nýggju filturskipanina, nýggja spilloljuverkið og høllina til serliga dálkandi burturkast.

Sum lániviðurskiftini vóru við ársskiftið, koma kapitalútreiðslurnar hjá IRF í hæddina í 2012 við 17,1 mió. kr. Flestu av lánunum verða útgoldin í 2018. Tá falla kapitalútreiðslurnar úr 12,9 mió. kr. til 3 mió. kr. Aðrar íløgur t.d. keyp av bilum og bingjum eru eginfíggjaðar.

Hóast nógvar og stórar íløgur eru gjørdar seinastu árini, eru enn stórar avbjóðingar fyri framman, um vit framhaldandi skulu hava eina nøktandi móttøku og viðgerð og klára at fylgja umhvørviskrøvum og rákinum annars. Vit kunnu m.a. nevna endaviðgerð av rottangaevju og dagføring av tyrvingarplássunum, sum mugu hava høga raðfesting í komandi árum.

Umframt omanfyri standandi lán, hevur IRF eitt lán hjá Føroya Landsstýri, sum er ein umfígging,ið varð framd undir kreppuni fyrst í nítiárunum.

## Spilloljuverkið

Spilloljuverkið á Kambsdali, sum IRF rekur eftir sáttmála við Føroya Landsstýri, tekur ímóti uml. 3.500 $m^3$ av spillolju og øðrum oljutilfari árliga. Reinsaða oljan varð, eins og undanfarin ár, seld til Fjarhitafelagið í Tórshavn, Havsbrún í Fuglafirði og Høvdavirkið í Leirvík.

Arbeiðið at byggja nýtt spilloljuverk á Hagaleiti er av ymsum orsøkum nógv seinkað. Nú er tó gongd komin á byggingina, og rokna vit við at taka nýggja spilloljuverkið og høllina til serliga dálkandi burturkast í nýtslu seinast í 2012.

Tá nýggja verkið verður tikið í brúk, verða eftir ætlan allar tekniskar installatiónir s.s. tangar v.m. tiknar niður á gamla verkinum. Ætlanin er síðani lýsa ognina til sølu.

Nýggja spilloljuverkið kemur at hava nógv størri móttøkuorku enn verandi spilloljuverk, eins og tað í neyðstøðum kann taka ímóti og reinsa munandi størri nøgd av spillolju enn verandi verk.

## Rottangaskipanin

Nýggjur slamsúgvari var keyptur til Suðuroynna á heysti í 2011.

## Bilverkstaðið

IRF hevur valt at selja bilverkstaðið í Gøtudali og at leiga verkstaðið hjá Elmari Zachariassen í Klaksvík í staðin.

Orsøkin til, at vit hava valt hesa loysnina er, at IRF metir verkstaðið og økið rundanum verkstaðið í Klaksvík at hóska betri til tørvin hjá IRF.

## Bilflotin

IRF hevur bílagt tríggjar nýggjar bilar til ruskinnsavningina í meginøkinum. Bilarnir hava tvíbýtt aggregat, soleiðis at til ber at heinta bæði gráar og hvítar posar samstundis. Bilarnir koma til landið seinast í mars og verða eftir ætlan tiknir í nýtslu í apríl 2012.

## Nevndin

Pauli Einarsson, Tvøroyri, tók seg úr nevndini í juni, og er tiltakslimurin Dánjal Bjarkhamar, Vágur, komin í nevndina í hansara stað.

Jógvan Skorheim, Klaksvík, tók seg úr nevndini í november og er tiltakslimurin Atli S. Justinussen, Árnafjørður, komin í nevndina í hansara stað.

Nýggir tiltakslimir skulu veljast á aðalfundinum fyri Dánjal Bjarkhamar og Atla S. Justinussen.

## Endi

Okkara endamál er at taka ímóti og viðgera alt burturkast á ein tílíkan hátt, at tað altíð er í eini góðari javnvág millum umhvørvi og kostnað. Hetta setir stór krøv til nevnd, leiðslu og starvsfólk hjá IRF. Neyðugt er alla tíðina at dagføra IRF soleiðis, at vit altíð hava tíðarhóskandi og vælvirkandi støðir og amboð, sum til eina og hvørja tíð liva upp til okkara endamál um eitt reint og heilt umhvørvi.

Sum nevnt aðrar staðir verða umleið tríggir fjórðingar av øllum burturkastinum brendir. Brenniburturkastið er rímiliga javnt býtt ímillum rusk frá húsarhaldi, burturkast frá bingjuplássum og burturkast frá virkjum. Endurvinning av burturkasti verður alt meira fjølbroytt, og tíðarandin talar fyri, at vit leggja enn meira áherðslu á endurvinning. Hetta ger eisini, at íløgan í øktu brenniorkuna verður drúgvari.

Tá ið nýggju posabilarnir við tvídeildum lastarúmi verða tiknir í nýtslu í meginøkinum í apríl 2012, kunnu húski seta hvíta posan hjá gráa posanum eftir tørvi. Hetta fer at lætta munandi um bæði hjá húsarhaldunum og IRF, og málið við hesi íløguni er at økja um endurvinning av pappíri frá húsarhaldunum.

Fyri at náa málinum um økta endurvinning er eisini umráðandi, at limakommunurnar hava dagført og væl skipað bingjupláss við starvsfólkum, sum hava fingið ta neyðugu upplæringina at handfara burturkast og evni, sum koma á bingjuplássini. Tað áliggur IRF at skipa fyri kunning av starvsfólkum í umsitingum og á bingjuplássum, og tað er uppgávan hjá politiska myndugleikanum í kommununum at ganga undan og stuðla hesum fólkum.

# UNDIR **SJÓNEYKUNI**

## Bingjuplássini

Frá miðskeiðis í nítiárunum til endan av 2011 var avrokningin fyri burturkast á bingjuplássunum sett soleiðis saman, at ein partur av nøgdini, nevniliga 1,36 $m^3$ fyri hvønn íbúgva um árið, varð roknaður upp í fasta ruskgjaldið, meðan nøgdin, sum fór uppum, varð avroknað fyri ein ávísan kostnað. Tey seinastu árini av hesum tíðarskeiðinum var avrokningarprísurin fyri tað, sum fór uppum, stórt sæð tann sami, sum virkini guldu ella fingu fyri at lata burturkast til IRF.

Nevnd og leiðsla hava í fleiri umførum viðgjørt møguleikan, at alt burturkast frá bingjuplássunum varð avroknað fyri sama takst sum burturkast frá virkjum, samstundis sum ruskgjaldið varð lækkað. Í 2010 hevði leiðslan fleiri kunnandi fundir við kommunurnar um hesi viðurskifti. Á eykaaðalfundi í november 2010 varð samtykt, at ruskgjaldið skuldi fara niður við 235 kr. fyri hvønn íbúgva, samstundis sum alt burturkast frá bingjuplássunum varð avroknað fyri galdandi takst. Eisini varð avrátt, at gjaldið og skipanin skuldu eftirmetast.

## Nøgdirnar

Tey seinastu árini hevur IRF tikið ímóti millum 150.000 og 160.000 $m^3$ av burturkasti. Av hesum koma millum 50.000 og 60.000 $m^3$ frá bingjuplássunum, ella ein triðingur av samlaðu nøgdini. Í 2010 og 2011 var nøgdin ávikavist 56.868 $m^3$ og 51.275 $m^3$. Tað svarar til ávikavist 1,99 og 1,80 $m^3$ fyri hvønn íbúgva í miðal. Nøgdin var sostatt 9,8% minni í 2011 enn í 2010.

Høvuðusbólkarnir av burturkasti frá bingjuplássunum eru brenniburturkast, jarn og metal, og pappír og papp. Í meðal verða 81–82% av burturkastinum brend, men nøgdin frá kommunu til kommunu kann vera rættiliga ymisk. (Mynd 1).

MYND 1: **Brenniburturkast frá bingjuplássunum í $m^3$ fyri hvørjar 100 íbúgvar**



MYND 2: Endurvinning av pappi og metali í kommunum við fleiri enn 1.500 íbúgvum, m³ fyri hvørjar 100 íbúgvarar um árið




MYND 3: Endurvinning av pappi og metali í kommunum við millum 500 og 1.500 íbúgvum, m³ fyri hvørjar 100 íbúgvarar um árið



MYND 4: **Endurvinning av pappi og metali í kommunum við færri enn 500 íbúgvum, m³ fyri hvørjar 100 íbúgvarar um árið**




Meginparturin av teimum eftirverandi 18–19% verður endurvunninn. Í viðgerðini av hesum eru kommunurnar býttar sundur eftir støðd fyri eisini at kanna, um størru plássini vísa ein fyrimun í mun til tey smærru plássini. Kommunurnar eru flokkaðar soleiðis:

- Kommunur við fleiri enn 1.500 íbúgvum
- Kommunur við millum 500 og 1.500 íbúgvum
- Kommunur við færri enn 500 íbúgvum.

## Pappír og papp

Henda kanning vísir, at í kommunum við fleiri enn 500 íbúgvum er nøgdin av pappíri og pappi gjøgnumgangandi lægri í 2011 enn í 2010 roknað sum m³ fyri hvørjar 100 íbúgvarar. Hetta kann stava frá fíggjarligu vánunum og tískil lægri nýtslu. Í fleiri av smæstu kommununum verður pappír og papp ikki skilt frá (Mynd 2, 3 og 4).

Harafturat sær tað út til, at líka nógv pappír og papp kann koma inn á bingjuplássini í miðalstóru kommununum sum í teimum størstu kommununum, nevniliga umleið 15 m³ papp og pappír fyri hvørjar 100 íbúgvarar.

Men í miðal kemur meira papp og pappír fyri hvørjar 100 íbúgvar frá teimum størstu plássunum, nevniliga ávikavist 14,1 og 11,9 m³ í 2010 og 2011 í mun til 11,2 m³ og 10,0 m³ frá teimum miðalstóru plássunum. Her skal tó viðmerkjast, at bingjuplássið í Vágs kommunu ikki skilir pappír og papp, og tað dregur miðaltalið fyri pappír og papp frá teimum miðalstóru plássunum nokkso fitt niður. Bingjuplássið í Skopunar kommunu hevur tó nógv tað hægstu nøgdina av pappíri og pappi, heilar 40 m³ fyri hvørjar 100 íbúgvar í 2011.

## Jarn og metal

Nøgdin av jarni og metali frá bingjuplássunum er eisini minkað fyri hvørjar 100 íbúgvarar frá 2010 til 2011. Hetta hóast IRF hevur goldið fyri jarn síðani á vári í 2009. Men búskaparliga støðan hevur eisini sín týdning fyri nýtslu av t.d. jarn- og metallutum (Mynd 2, 3 og 4).

Verður hugt at nøgdini av jarni og metali í mun til støddina á kommununum, sær støðan øðrvísi út. Tað kemur munandi meira jarn og metal fyri hvørjar 100 íbúgvar frá bingjuplássunum í teimum miðalstóru

MYND 5: **Nøgd av burturkasti frá bingjuplássunum í m³ fyri hvønn íbúgva í 2010 og 2011**




kommununum enn frá teimum størstu kommununum. Í miðal ávikavist 24,7 og 21,2 m³ frá teimum miðalstóru plássunum í 2010 og 2011 í mun til 17,5 m³ og 16,9 m³ frá teimum størstu.

Nøgdin av jarni fyri hvørjar 100 íbúgvar í teimum smæstu kommununum sveiggjar nógv. Tað kann koma av, at bingjurnar eru lutfalsliga stórar, so ein bingjutøming meira ella minni kann gera stóran mun.

Í gomlu skipanini vóru 1,36 m³ fyri hvønn íbúgva um árið av burturkasti av bingjuplássunum uppi í limagjaldinum. Klaksvíkar kommuna hevur í fleiri ár víst, at tað ber til at halda nøgdina niðri á hesum støði, samstundis sum at hon hevur eitt væl virkandi bingjupláss. Nakrar kommunur liggja á umleið 1,5 m³ fyri hvønn íbúgva, meðan tær hægstu hava meira enn 2,5 m³ fyri hvønn íbúgva (Mynd 5). Tað merkir at flestu kommunur hava møguleika at minka um kostnaðin fyri at reka bingjuplássið.

## Kostnaður

Við nýggju avrokningarskipanini verður alt burturkast avroknað fyri galdandi takst. Tað merkir, at alt burturkast frá fyrsta rúmmetri ella fyrsta kg, verður avroknað, í mun til gomlu skipanina, har einki varð avroknað, fyrr enn farið varð upp um kvotuna fyri hvørja kommunu sær. Harafturat varð serliga dálkandi og vandamikið burturkast og elektronikkur avroknað fyri ein nógv lægri kostnað enn galdandi takstir.

Sum nevnt frammanfyri lækkaði ruskgjaldið við 235 kr. fyri hvønn íbúgva, tá avrokningarskipanin fyri bingjuplássini varð løgd um.

MYND 6: **Kostnaður fyri hvønn íbúgva fyri burturkast av bingjuplássunum í 2010 og 2011**




Mynd 6 vísir kostnaðin fyri eykagjald fyri hvønn íbúgva fyri burturkast frá bingjuplássunum í 2010 og samlaða kostnaðin fyri hvønn íbúgva fyri alt burturkast frá bingjuplássunum í 2011. Í 2010 hevði eykagjaldið lítlan týdning fyri kostnaðin at reka bingjuplássini í fleiri kommunum. Flestu av hesum kommunum hava eisini tann lægsta rakstrarkostnaðin í 2011.

Nakrar kommunur, bæði stórar og smáar, gjalda nær við 235 kr. fyri hvønn íbúgva fyri burturkast av bingjuplássunum, íroknað kostnað fyri elektronikk og serliga dálkandi og vandamikið burturkast, sum í 2011 kostaði góðar 23 kr. fyri hvønn íbúgva. Í seks kommunum liggur kostnaðurin niðanfyri 300 kr. fyri hvønn íbúgva, og í seks øðrum kommunum liggur kostnaðurin omanfyri 400 kr. fyri hvønn íbúgva.

Niðurstøðan verður tí, at tað ber til at reka bingjuplássini fyri umleið tann kostnað, sum limagjaldið lækkaði. Lækkingin varð sett til 235 kr, tí roknað var við, at fleiri kommunur fóru at skipa mannagongdirnar á bingjuplássunum soleiðis, at bingjuplássini í enn størri mun enn fyrr, fóru at royna at avmarka brúkaraskaran til tann, sum bingjuplássini eru ætlaði til, og sum er lýstur í „Kunngerð um burturkast" og samtyktur í „IRF-reglum um burturkast frá húsarhaldum."

# HAGTØL 2011

Øll skráseting av móttiknum burturkasti, undantikið serliga dálkandi burturkast, verður gjørd í m$^3$. Brenniburturkast verður vigað inn í ovnin. Í sambandi við útflutning av burturkasti stavar vektin frá móttakaranum.

Í februar 2011 tók IRF eina nýggja rakstrar- og skrásetingarskipan í nýtslu. Skipanin er eitt sera hent amboð at leggja til rættis og samskipa allan flutning og móttøku av burturkasti, samstundis sum hon lýsir virksemið í hesum sambandi sera væl. Umvegis uttanhýsis telduskipan er samband millum skrivstovu og bilar allan dagin. Taltilfar frá rakstarskipanini verður heintað yvir í faktureringsskipanina í bókhaldinum.

IRF tók ímóti 157.588 m$^3$ av burturkasti frá húskjum, bingjuplássum, virkjum og øðrum í 2011 (Talva 1). Tað er ein vøkstur upp á 2,5% í mun til 2010. Ein grund til hækkingina er, at IRF tók ímóti sløkum 2.500 m$^3$ av burturkasti at brenna frá Kommunalu Brennistøðini á Hjalla. Annars hevði nøgdin at brenna verið minkað eitt vet. Nógv tann størsti parturin varð eisini brendur í fjør, sløk 76%.

TALVA 1. **Burturkastnøgd í m$^3$, sum IRF tók ímóti frá húskjum, bingjuplássum, virkjum og øðrum í 2010 og 2011**

| VIÐGERÐ | 2010 | 2011 | MUNUR, % |
|---|---|---|---|
| Brenning | 117.821 | 119.655 | 1,6 |
| Endurvinning | 34.222 | 35.610 | 4,1 |
| Tyrving | 1.706 | 2.323 | 36,2 |
| **Til saman** | **153.749** | **157.588** | **2,5** |

## Endurvinning

Endurvinning av burturkasti umfatar innsavning og útflutning av pappíri, plasti, metalum og elektronikki.

Spillolja, sum verður innsavnað, reinsað og brúkt í Føroyum, verður eisini roknað sum endurvunnið burturkast.

## Pappír og papp

Skiljihøllin á Hagaleiti tekur ímóti pappíri og pappi úr øllum landinum. Í 2011 tók Skiljihøllin ímóti 22.971 m$^3$ av pappíri og pappi, sum er 7% meira enn í 2010. Av tí samlaða komu 4.634 m$^3$ av pappíri og pappi úr Tórshavnar Kommunu, sum er ein minking upp á sløk 35% í mun til 2010.

Samlaði útflutningurin av pappíri og pappi var 1.657 tons, sum er sløk 5% minni enn 2010 (Talva 2).

## Plast

Talan er um stórar plastsekkir, garnaleivdir, polystyrene (flamingo), innballingarplast og einnýtisíløt (PET-fløskur). Í 2011 tók IRF ímóti 4.776 m$^3$ av plastúrdráttum. Tað er ein vøkstur upp á góð 108 %. Útflutt vóru 322 tons av plastburturkasti í alt (Talva 2).

Stórsekkir frá alivinnuni vóru 2.688 m³, sum er 56% av plastnøgdini. Árið fyri vóru stórsekkir tríggir fjórðingar av plastnøgdini. Útflutningurin var 205 tons í mun til 128 tons í 2010.

Einnýtisíløt úr plasti (PET-fløskur) var eitt nýtt ískoyti til endurvinning av plasti í 2009, tá IRF tók ímóti 311 m³. Í 2010 vaks nøgdin av PET-fløskum til 465 m³ og í 2011 til 1.928 m³. Tað er ein ferfalding í mun til 2010. Útflutningurin var 58 tons í mun til 9,8 tons í 2010.

## Jarn og metal

IRF tók ímóti 7.863 m³ av jarni í 2011, sum er heldur minni enn í 2010. Í fjør vórðu bert 811 tons av jarni og metalum avskipað beinleiðis til móttakara uttanlands. Seinasta avskipingin í 2010 var beint fyri árskiftið, so bert eini 300 m³ lógu á goymslu við ársenda 2010. Við ársenda í 2011 var jarngoymslan harafturímóti mest sum full og seint í januar 2012 vóru 756 tons av gomlum jarni avskipað.

Meginparturin er lættjarn og metal frá bingjuplássunum, men seinnu árini hevur eisini verið nakað av tyngri lutum.

Talið av bilvrakum við skrásetingarskjølum var 104 í 2011 í mun til 128 árið fyri. Hetta eru bilvrak, sum IRF tekur ímóti og avgreiðir endurgjald fyri eigaran í Suðuroy og Sandoy. Hetta er lægsta talið seinastu seks árini (Talva 2).

## Elektronikkur

Tað sær út til, at nøgdin av elektriskum og elektroniskum burturkasti við verandi skipan liggur um 120 tons um árið. Í 2011 útflutti IRF 121 tons av elektroniskum burturkasti í mun til góð 111 tons í 2010 (Talva 2). Harafturat hava starvsfólk hjá Dugna á Kambsdali tikið 813 teldur sundur í 2011 í mun til 695 teldur árið fyri. Hetta ger, at bert ein partur av teldunum fer av landinum sum elektroniskt burturkast. Húsin fer sum jarn til endurvinning og plastið verður brent.

Tær vanligu hvítvørurnar verða enn ikki roknaðar upp í elektroniskt burturkast, sum í ES, men verða roknaðar upp í jarn og metal ella CFC-burturkast (Talva 2). Í 2011 útflutti IRF 65,0 tons av CFC-burturkasti, sum er kuldaskáp og frystiboksir.

## Spillolja

Spilloljuverkið á Kambsdali tók ímóti 3.454 m³ í 2011, sum er ein minking upp á góð 6% í mun til 2010. Sølan av reinsaðari spillolju var 1.415 m³ í 2011, sum er 11,7% minni enn í 2010 (Talva 2).

### TALVA 2. Endurnýtsla av burturkasti. Tølini eru avskipaðar nøgdir

| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Pappír og papp, tons | 1.912 | 2.077 | 1.699 | 1.741 | 1.657 |
| Háorkuburturkast, tons | 220 | 642 | 188 | 167 | 0 |
| Bleytt plast, tons | 0 | 0 | 0 | 0 | 257 |
| Einnýtis fløskur, tons | 0 | 0 | 0 | 0 | 58,0 |
| Einnýtis metalíløt, tons | 0 | 0 | 0 | 0 | 2,3 |
| Annað, tons | 0 | 0 | 0 | 0 | 6,6 |
| Jarn og metal, tons | 2.396 | 1.808 | 1.350 | 2.266 | 811 |
| Bilar móti endurgjaldi, stk. | 132 | 203 | 167 | 128 | 104 |
| Elektronikkur, tons | 120,1 | 124,1 | 135,3 | 111,2 | 121,0 |
| CFC-burturkast, tons | 79,5 | 118,0 | 73,8 | 75,1 | 65,0 |
| Spilloljusøla, m³ | 1.512 | 1.457 | 1.439 | 1.603 | 1.415 |

## Brenning

Brennistøðin var í vanligum rakstri alt 2011. Ovnurin brendi 17.532 tons í 6.998 tímar. Í miðal brendi ovnurin 2,51 tons um tíman. Sum nevnt frammanfyri vaks nøgdin av burturkasti at brenna 1,6% í 2011 í mun til 2010. Virksemið á Hagaleiti brúkti í fjør 95,0 kWt í elektrisiteti fyri hvørt tons, sum varð brent.

Brennistøðin framleiddi 47.169 MWh og veitti 17.801 MWh av fjarhita til Faroe Marine Products, Høvdavirkið, í 2011. Veitingin svarar til ein mátt upp á 2,54 MW hvønn tíma Brennistøðin var í rakstri í 2011 í mun til 2,94 MW í 2010.

### TALVA 3. Brenning av burturkasti

| EVNI | 2007 | 2008 | 2009*) | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Brent, tímar | 7.987 | 7.942 | 5.793 | 7.379 | 6.998 |
| Brent hjá IRF, tons | 16.962 | 16.327 | 14.765 | 19.556 | 17.532 |
| Brent hjá KB, tons | 867 | 953 | 26 | 0 | 0 |
| Brent í alt, tons | 17.829 | 17.280 | 14.791 | 19.556 | 17.532 |
| Brent hjá IRF, tons/tíma | 2,12 | 2,06 | 2,55 | 2,65 | 2,51 |
| Veittur fjarhiti, MWh | 17.659 | 17.799 | 15.757 | 21.679 | 17.801 |
| Roykburturkast á goymslu, tons | 21 | 567 | 324 | 153 | 576 |
| Timbur á goymslu, tons | 1.000 | 3.000 | 1.600 | 0 | 0 |
| Ballað burturk. á goymslu, tons | 0 | 0 | 1.930 | 0 | 0 |
| Vátt papp á goymslu, tons | 0 | 0 | 0 | 100 | 0 |

*) Brennistøðin umbygd frá 10. januar til 20. apríl 2009.

## Tyrving

Í 2011 tók IRF ímóti 2.323 $m^3$ av burturkasti at tyrva frá kundum. Blandað tyrviburturkast, trolleivdir, asbest og bjálving vóru størstu bólkarnir.

Tilsaman vórðu 697 tons av burturkasti tyrvd á tyrvingarplássunum í 2010 (Talva 4). Hetta er munandi minni enn árini frammanundan. Ilska frá Brennistøðini, 2.140 tons, varð tyrvd í Oyndarfirði.

### TALVA 4. Tyrving av burturkasti

| TILFAR | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ilska, tons | 2.126 | 2.214 | 2.120 | 2.846 | 2.140 |
| Flogøska, tons | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað, tons | 9.440 | 2.018 | 2.858 | 3.636 | 697 |

## Serliga dálkandi burturkast

IRF avskipaði 46,7 tons av akkumulatorum í 2010, sum eru sløk 10% minni enn árið fyri (Talva 5).

IRF hevur brent máling í ovninum á Hagaleiti síðani miðskeiðis í 2009.

Oljuevja frá Spilloljuverkinum verður send av landinum til viðgerðar. Í 2011 var nøgdin 16,8 tons, sum er munandi minni enn árið fyri.

IRF sendi 218 tons av evju frá nótavaski til viðgerðar í Svøríki í 2011 í mun til 43 tons árið fyri. Roknað verður við, at nøgdin fer at liggja millum 250 og 300 tons um árið.

IRF og Kommunala Brennistøðin hava felags goymslu til roykburturkast frá brennistøðunum. Við ársenda 2011 var parturin hjá IRF 576 tons, sum verða avskipað í mars 2012 (Talva 3).

Nógv dálkað deksvatn kom frá oljuleitingini á Landgrunninum í 2010, og tey seinastu 122 tonsini vóru avskipað fyrst í 2011.

Annars vóru 13,6 tons av øðrum serliga dálkandi burturkasti send til viðgerðar uttanlands í 2011. Hetta eru smærri nøgdir av nógvum ymiskum kemikalium, sýrum og basum.

### TALVA 5. Útflutningur av serliga dálkandi burturkasti

| TILFAR | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Akkumulatorar, tons | 35,9 | 31,2 | 52,0 | 51,8 | 46,7 |
| Máling, tons | 25,6 | 20,4 | 18,1 | 0 | 0 |
| Fotoveskur, tons | 1,0 | 1,3 | 0 | 0 | 0 |
| Spilloljuslamm, tons | 125,5 | 126,4 | 103,3 | 105,9 | 16,8 |
| Evja frá nótavaski, tons | 0 | 0 | 0 | 43,4 | 218,2 |
| Deksvatn, oljuboring, tons | 59,8 | 0 | 0 | 285,7 | 122,2 |
| Roykburturkast, tons | 686,4 | 0 | 485,3 | 571,5 | 0 |
| Annað, tons | 12,7 | 9,5 | 3,4 | 9,6 | 13,6 |

## Rottangatøming

Fleiri enn 11.600 rottangar eru skrásettir í rottangaskipanini hjá IRF. Rottangar verða tømdir í eini tilrættalagdari skipan, sonevnd reglulig tøming. Tangar, sum av onkrari orsøk ikki verða tømdir í regluligu tømingini, verða tømdir í einum eyka tømingarumfari. Rottangabilarnir tømdu tilsamans 6.593 rottangaeindir í IRF limakommununum í 2010. Hetta eru 691 færri enn árið fyri (Talva 6).

Góð 15% av tangunum hava brek, og sløk 12% av tangunum verða ikki tømdir í regluliga tømingarumfarinum vegna brek. Ein partur av hesum verða so tømdir í eyka tømingarumfari.

Árini frammanundan hevur IRF sent fráboðanir út í hvørt hús um, at rottangabilur kemur at tøma rottangan. Hetta er ein rættiliga kostnaðarmikil skipan at umsita, um alt verður roknað við. Í 2011 hava fráboðanir ikki verið sendar út fyri at síggja, hvørja ávirkan tað hevur á talið á eykatømingum sum frá líður.

### TALVA 6. Tøming av rottangum. Tal av tømdum tangum

| ROTTANGATØMING | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| Reglulig tøming | 4.132 | 5.970 | 4.382 | 6.852 | 5.562 |
| Eyka tømingarumfar | 111 | 101 | 180 | 152 | 384 |
| Tilkallitøming | 0 | 275 | 443 | 280 | 547 |
| Tilsamans | 4.243 | 6.346 | 4.995 | 7.284 | 6.593 |

# HØVUÐSTØL

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **INNTØKUR** | | | | | | | | | |
| Limagjald | 41.419 | 41.509 | 41.242 | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 |
| Aðrar inntøkur | 17.634 | 18.768 | 18.933 | 19.645 | 29.317 | 27.112 | 19.889 | 28.566 | 27.489 |
| **Inntøkur tilsamans** | 59.053 | 60.278 | 60.175 | 61.607 | 71.762 | 68.630 | 64.065 | 73.150 | 72.826 |
| **ÚTREIÐSLUR** | | | | | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur | 40.320 | 42.156 | 41.808 | 45.510 | 50.313 | 54.646 | 48.870 | 51.828 | 51.669 |
| Rentuútreiðslur | 4.178 | 3.203 | 2.968 | 2.861 | 2.656 | 2.637 | 4.794 | 4.633 | 4.899 |
| Avskrivingar | 8.313 | 8.872 | 8.888 | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 |
| **Útreiðslur tilsamans** | 52.811 | 54.231 | 53.665 | 58.340 | 63.967 | 66.615 | 64.213 | 68.214 | 67.609 |
| **Úrslit** | 6.242 | 6.047 | 6.510 | 3.267 | 7.795 | 2.015 | -147 | 4.937 | 5.217 |
| **Eginogn** | 21.608 | 27.655 | 34.865 | 38.133 | 21.716 | 23.284 | 23.137 | 28.073 | 32.591 |

## INNTØKUR FRÁ 2003–2011




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Limagjald** | 41.419 | 41.509 | 41.242 | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 |
| **Aðrar inntøkur** | 17.634 | 18.768 | 18.933 | 19.645 | 29.317 | 27.112 | 19.889 | 28.566 | 27.489 |

## ÚTREIÐSLUR FRÁ 2003–2011




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur** | 40.320 | 42.156 | 41.808 | 45.510 | 50.313 | 54.646 | 48.870 | 51.828 | 51.669 |
| **Rentuútreiðslur** | 4.178 | 3.203 | 2.968 | 2.861 | 2.656 | 2.637 | 4.794 | 4.633 | 4.899 |
| **Avskrivingar** | 8.313 | 8.872 | 8.888 | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 |

## RAKSTRARÚRSLIT AFTAN Á AVSKRIVINGAR OG RENTUR




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarúrslit** | 6.242 | 6.047 | 6.510 | 3.267 | 7.795 | 2.015 | -147 | 4.937 | 5.217 |

## EGINOGN FRÁ 2003–2011




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Eginogn** | 21.608 | 27.655 | 34.865 | 38.133 | 21.716 | 23.284 | 23.137 | 28.073 | 32.591 |

# GONGDIN Í RAKSTRINUM
# 2003–2011

| kr. x 1000 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **INNTØKUR** | | | | | | | | | |
| Kommunugjøld | 41.419 | 41.509 | 41.242 | 41.962 | 42.445 | 41.518 | 44.176 | 44.584 | 45.337 |
| Virkisburturkast v.m. | 12.692 | 13.634 | 13.682 | 14.116 | 22.104 | 18.252 | 12.287 | 17.713 | 17.406 |
| Spilloljuverkið | 3.312 | 3.314 | 3.445 | 3.776 | 3.736 | 4.687 | 4.637 | 4.044 | 4.926 |
| Verkstaður | 1.065 | 1.207 | 1.170 | 924 | 1.114 | 1.058 | 1.179 | 1.207 | 1.611 |
| Søla | 566 | 614 | 636 | 830 | 2.364 | 3.114 | 1.786 | 5.602 | 3.547 |
| **Inntøkur tilsamans** | **59.053** | **60.278** | **60.175** | **61.607** | **71.762** | **68.630** | **64.065** | **73.150** | **72.826** |
| | | | | | | | | | |
| **ÚTREIÐSLUR** | | | | | | | | | |
| Sáttmálaarbeiði | 616 | 1.031 | 612 | 1.424 | 790 | 795 | 156 | 74 | 72 |
| Lønarútreiðslur | 18.807 | 19.601 | 19.282 | 20.226 | 20.858 | 21.594 | 22.231 | 21.529 | 21.988 |
| Orka | 1.734 | 1.666 | 1.742 | 1.905 | 2.040 | 2.411 | 2.076 | 2.371 | 2.631 |
| Tilfar | 937 | 1.087 | 1.065 | 1.519 | 1.843 | 2.045 | 1.840 | 2.192 | 2.158 |
| Flutningur | 4.664 | 4.870 | 5.047 | 4.772 | 7.615 | 8.964 | 6.187 | 7.282 | 5.427 |
| Viðgerð uttanlands | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 895 |
| Bingjupláss | 255 | 221 | 238 | 116 | 24 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Tyrvingarpláss | 1.696 | 1.963 | 1.658 | 1.237 | 1.352 | 2.259 | 1.791 | 2.296 | 1.359 |
| Størri amboð | 3.841 | 4.050 | 4.411 | 4.933 | 5.142 | 6.263 | 4.791 | 6.195 | 6.965 |
| Skrivstovuhald | 1.356 | 1.440 | 1.162 | 1.418 | 1.538 | 1.423 | 1.498 | 1.435 | 1.476 |
| Maskinanlegg | 595 | 1.265 | 1.494 | 2.523 | 2.492 | 1.514 | 1.131 | 1.607 | 1.541 |
| Bygningur | 406 | 336 | 526 | 347 | 639 | 363 | 367 | 401 | 396 |
| Verkstaður, PLC v.m. | 242 | 143 | 211 | 231 | 448 | 550 | 436 | 596 | 420 |
| Ferðing og umboðan | 930 | 749 | 744 | 1.046 | 1.165 | 1.349 | 981 | 896 | 1.044 |
| Uttanhýsistænastur | 1.224 | 816 | 503 | 466 | 664 | 739 | 754 | 667 | 850 |
| Tryggingar | 1.833 | 1.697 | 1.669 | 1.510 | 1.524 | 1.750 | 1.380 | 1.016 | 996 |
| Starvsfólkaútreiðslur | 1.113 | 1.220 | 1.444 | 1.837 | 2.179 | 2.627 | 3.251 | 3.271 | 3.451 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **40.249** | **42.156** | **41.808** | **45.510** | **50.313** | **54.646** | **48.870** | **51.828** | **51.669** |
| | | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn avskriv.** | **18.804** | **18.121** | **18.367** | **16.097** | **21.450** | **13.984** | **15.195** | **21.323** | **21.157** |
| | | | | | | | | | |
| Avskrivingar | 8.313 | 8.872 | 8.888 | 9.969 | 10.999 | 9.332 | 10.548 | 11.753 | 11.040 |
| Tap | 71 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **10.420** | **9.249** | **9.479** | **6.128** | **10.451** | **4.652** | **4.647** | **9.570** | **10.117** |
| | | | | | | | | | |
| **RENTUR** | | | | | | | | | |
| Bankarent. og prov. v.m. | -170 | -206 | -156 | -154 | -417 | -533 | -203 | -158 | -189 |
| Prioritetsrentur | 4.348 | 3.408 | 3.124 | 3.014 | 3.073 | 3.170 | 4.997 | 4.790 | 5.089 |
